# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1208.
# Tíðarskeið: 21/03-28/03 - 2012

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen, Sigvald Kristiansen og Mourits Mohr Joensen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski, rogni og øðrum, varð selt til matstovuvinnuna í Havn.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 21/3 kl. 21. Byrjaðu at taka støðir á Føroyabanka hósmorgunin og kláraðu at taka allar 29 trolstøðirnar, umframt CTD-støðir, í fimm dagar, tí veðrið var so avbera gott. Vit landaðu í Havn týsmorgunin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var ikki eftir ætlan (umleið 400), tí vit fingu so lítið av toski, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 28. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 20. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Sera lítið var at fáa av toski (1319 kg, 93 stykkir), sí Talvu 1, sum harvið er eitt tað minsta, sum Magnus Heinason hevur fingið á Føroyabanka seinastu umleið 20 árini. Eisini var lítið fingið av hýsu. Hinvegin fingu vit eitt stórt hál við knurrhana. Ein partur av veiðuni varð fingin í pavnin, meðan restin mátti koyrast útfaftur gjøgnum sliskuna, tí knurrhanarnir sótu fastir í trolposanum. Veiðan varð viðgjørd sum óskildur prøvi og samlað vekt á allari veiðuni í trolposanum var mett til 150 kassar (7500 kg). Knurrhanin var ikki gýtandi (hóast komin nakað ávegis) og át krill. Magakanningarnar vístu, at tað framvegis var lítið til av nebbasild, men tó var meira enn tey seinastu árini. Vit fingu ein lítlan tosk (36 cm), sum er sera sjáldsamt, og hann var fingin á djúpum vatni. Eisini fingu vit nakrar smáar hýsur (16 cm).

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1208.

| FISKASLAG | KG í 29 hálum | Nytrur | Magar | KG í 25 hálum í fjør | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| KNURRHANI | 6568.73 | | 10 | 51.35 | 110.27 |
| HAVMÚS | 3543.63 | | | 1093.66 | 2.79 |
| TOSKUR | 1319.16 | 93 | 48 | 2448.03 | 0.46 |
| HÝSA | 1318.38 | 288 | 72 | 1773.21 | 0.64 |
| GULLLAKSUR | 797.76 | | | 257.59 | 2.67 |
| SVARTKJAFTUR | 627.74 | | | 41.35 | 13.09 |
| SILVURMURTUR | 423.65 | | | 0.00 | |
| LONGA | 294.31 | | | 264.80 | 0.96 |
| UPSI | 210.71 | 49 | 21 | 202.24 | 0.90 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 204.27 | | | 9.98 | 17.65 |
| GLÝSUFISKUR | 197.33 | | | 660.33 | 0.26 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 97.38 | | | 51.49 | 1.63 |
| HAVTASKA | 94.94 | 17 | | 9.52 | 8.60 |
| LOLIGO | 94.56 | | | 368.04 | 0.22 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 61.61 | | | 4.17 | 12.74 |
| SKRAMBUL | 58.58 | | | 102.82 | 0.49 |
| GLASKVOYSA | 53.55 | | | 3.58 | 12.90 |
| BROSMA | 52.07 | | | 46.20 | 0.97 |
| KALVI | 41.89 | 2 | 2 | 7.36 | 4.91 |
| SKØTA | 40.55 | | | 39.65 | 0.88 |
| ROSSAMAKRELUR | 29.86 | | | 5.07 | 5.08 |
| HEMARI | 15.70 | | | 0.00 | |
| STEINBÍTUR | 13.21 | | | 0.00 | |
| LÁLLA | 9.86 | | | 0.00 | |
| TUNGA | 9.69 | | | 18.19 | 0.46 |
| NEBBASILD | 8.16 | | | 4.02 | 1.75 |
| BLÁRIDDARI | 6.61 | | | 0.00 | |
| HVALSPÝGGJ | 5.44 | | | 0.00 | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 5.19 | | | 4.23 | 1.06 |
| RÍSNA LANGASPORL | 4.74 | | | 0.00 | |
| LÍTLA BROSMA | 4.41 | | | 0.00 | |
| SANDSPRØKA | 3.96 | | | 7.88 | 0.43 |
| REYÐI KNURRHANI | 3.62 | | | 4.37 | 0.71 |
| REYÐKRABBI | 3.08 | | | 0.00 | |
| TRANTKONGAFISKUR | 1.84 | | | 1.74 | 0.91 |
| BLÁLONGA | 1.50 | | | 0.00 | |
| MAKRELUR | 0.48 | | | 0.04 | 11.92 |
| KLINGRUSKØTA | 0.43 | | | 0.50 | 0.75 |
| HUMMARI | 0.22 | | | 0.00 | |
| BLETTUTUR FLOYFISKUR | 0.01 | | | 0.00 | |
| TILSAMANS | 16228.79 | 449 | 153 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur1208d.doc.

Petur Steingrund